# Ítrótta FAGNAÐUR

## Heiðursskjal Poul E. Petersen

***INNSTILLING:***

Heiðursskjal Poul E. Petersen verður latið eini eldsál, sum í ein mansaldur hevur tænt føroyskum ítrótti á fyrimyndarligan, ósjálvsøknan hátt.

Hendan fyrimyndarliga eldsálin er ein, sum hevur verið - ella framvegis er - virkin í felagnum/sambandinum. Viðkomandi hevur verið eyðsýnd/ur og hevur sett í gongd, organisera og motivera. Púra ósjálvsøkin hevur hann ella hon tikið eyka tøk, sum tey flestu ikki megna, og hevur soleiðis syrgt fyri, at felagsskapurin kann virka. Viðkomandi hevur tryggjað eitt gott umhvørvi, har limirnir kunnu koma, mennast og kenna seg vælkomnar.

**Í grundgevingunum kunnu tit greiða frá, hvussu viðkomandi, sum tit skjóta upp, eitt nú:**

- ósjálvsøkin hevur tænt føroyskum ítrótti.
- í nógv ár hevur sett gongd á og/ella hildið virkseminum uppi.
- hevur organiserað og samskipað á ymsar hættir.
- motiverar íðkarar, venjarar, nevndarlimir, foreldur, hjálparfólk osfr.
- hevur ment felagið ella sambandið til tað, tað er í dag.
- altíð er klár/ur við eini hjálpandi hond.
- altíð er álítandi.
- á serligan hátt hevur tryggjað samanhaldið í felagnum ella sambandinum.

***Arbeiðsgongd:***

- Øll kunnu senda inn uppskot um, hvør skal fáa heiðurskjal Poul E. Petersen. Tann, sum verður skotin upp, skal hava virkað fyri føroyskum ítrótti í ein mansaldur.
- Nevnd Poul E. Petersen lesur øll uppskotini og tekur avgerð um, hvør skal fáa heiðusskjalið.
- Ein persónur kann fáa heiðursskjalið hvørt ár. Nevndin kann taka avgerð um, at einki heiðursskjal verður latið.

**Uppskot verða send inn við eini leinkju, sum verður send út við telduposti ella løgd á heimasíðuna og sosialar miðlar**